Samráðingar um markið aftur útsettar:

Bretar skifta samráðingarleiðara út

Bretar eiga útspælið og hava teir biðið um at fáa samráðinarnar útsettar sigur Edmund Joensen løgmaður við Útvarp Føroya. Hann kennir ikki orsøkina, men sigur, at hetta kann hava við leiðaraskifti í bretsku samráðingarnevndini at gera og at bretar eisini skulu hava nýggjan orkumálaráðharra

Jan Muller

Ætlanin var, at eitt nýtt samráðingarumfar um markið millum Føroyar og Bretland skuldi vera í juli ella í august. Hetta verður nú av øngum sambært tíðindunum í Útvarpi Føroya fíggjakvøldið.

Edmund Joensen løgmaður segði við útvarpið, at bretar hava biðið um at fáa samráðingarnar útsettar til í september ella oktober. Hann kennir ikki orsøkina men nevnir to tveir møguleikar fyri hesa útseting.

Annar er tann, at tað ljóðar, at leiðarin í bretsku samráðingarnevndini í møng ár, David Anderson skal í nýtt starv við ein EUd-dómstól innan havrætt og at hann tí helst tekur seg úr samráðingarnevndini. Hin orsøkin kann hava nakað við broyting í bretsku stjórnini at gera. Tim Eggart, sum hevur verið orkumálaráðharri í møng ár, fer úr stjórnini og annar kemur í hansara stað. Tað er hann, sum stingur út kósina í samráðingunum um markið.

David Anderson her saman við Arna Olafson, leiðaranum í føroysku samráðingarnevndini. Mynd jun

---

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2565

Navn: Sp/f Mangt og Hvat

Adressa: 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna

Stovningardato: 01.07.1996

Viðtøkudato: 01.07.1996

Kapitalur: Kr. 200.000,00

Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 200.000,00 til kurs 100.

Stovnarar: Ingrid Dahl Jensen, 900 Vágur

Stjórn: Ingrid Dahl Jensen, 900 Vágur

Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.

Grannskoðari: Sp/f Rasmussen & Weihe, løggildir grannskoðarar, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.

Roknskaparár: 01.01.–31.12.

Fyrsta roknskaparár: 01.07.1996–31.12.1996

Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, heilsølu og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 8. juli 1996

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2557

Navn: P/f. Karvi

Adressa: 530 Fuglafjørður

Kommuna: Fuglafjarðar Kommuna

Stovningardato: 31.12.1995

Viðtøkudato: 31.12.1995

Kapitalur: Kr. 500.000,00

Inngjaldingarháttur: Kr. 500.000,00 í øðrum virðum.

Stovnarar: Fuglafjarðar Handverkarafelag, 530 Fuglafjørður, Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag, 530 Fuglafjørður og Fuglafjarðar Arbeiðskvinnufelag, 530 Fuglafjørður

Nevnd: Margretha Rasmussen, Grønatugva 32, 530 Fuglafjørður (formaður), Kaj Eli Richardsson Poulsen, Innandalsvegur 22, 530 Fuglafjørður, Una Abrahamsen, Kambsdalur, Símon Aksel Abrahamsen, Um Heygar 3, 530 Fuglafjørður og Jákup Johnsson Thomsen, Torkilskrókur 3, 530 Fuglafjørður

Stjórn: Jákup Johnsson Thomsen, Torkilskrókur 3,530 Fuglafjørður

Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum, nevndarformanninum ella tveimum nevndarlimum í felag.

Grannskoðari: P/F Grannskoðarastovan á Skála.

Roknskaparár: 01.01.–31.12.

Fyrsta roknskaparár: 31.12.1995–31.12.1996

Endamál: Endamál felagsins er útleigan, handil, handverk og ídnaður, umframt alla aðra vinnu, sum stendur í samband við nevnda rakstur.

Skráseting Føroya
tann 5. juli 1996

Kristin Balle

Tíðindaskriv frá Menningarstovuni:

Føroysk luttøka á framsýningum uttanlands 1996 og 1997

1996: FISHING 96 í Aberdeen & ICELANDIC FISHERIES EXHIBITION

Undir heitinum *NORTH ATLANTIC RESOURCE CENTRE* bjóðaðu føroyskar fyritøkur seg fram í mars mánaði á fiskivinnuframsýningini FISHING 96 í Aberdeen. Aftur í døgunum 18.–21. september 1996 faara 16 føroyskar fyritøkur at bjóða seg fram á fiskivinnuframsýningini *ICELANDIC FISHERIES EXHIBITION* í Laugardagshøllini í Reykjavík.

Fyritøkurnar eru á einum máli um, at hjá teimum liggur í at veita útlendskum keyparum vørur og tænastur á høgum góðskustigi, og at útlendsku keypararnir mugu leitast upp, um fyritøkurnar skulu hava kans at verða spurdar og sleppa at royna seg í kapping við aðrar. Fyritøkurnar eru somuleiðis samdar um, at fara tær einsamallar og hvør einsæris út, siggjast tær illa aftur millum teir stóru basarnar. Saman, har hvør fyritøka kemur við sínum serstøku førleikum og tænastum, bjóða føroysku fyritøkurnar frá fjølbroyttum tilboðum, ið útlendskar fyritøkur hava hug at leita upp – fyri at keypa frá, fyri at veita tilboð til og fyri at fáa nýggj sambond við og finna samstarvsfelagar millum.

1997: FISHING 97 & OFFSHORE EUROPE 97

Longu í mars mánaði komandi ár, fara føroyksar fyritøkur aftur at gera vart við *NORTH ATLANTIC RESOURCE CENTRE*, tá FISHING 97 verður aftur í Aberdeen, og tíðin er longu komin hjá føroyskum fyritøkum at hugsa um luttøku á OFFSHORE EUROPE 97, ið verður í Aberdeen sama heyst. Í fjør varð reikað fyri stórari føroyskari luttøku á Offshore Europe 95, og frá mongum hava vit seinni frætt, at føroyska framsýningarluttøkan vakti virðing og áhuga.

Einki er at ivast í, at føroyskar fyritøkur kunnu gera enn meira um seg á OFFSHORE EUROPE 97. Tá er vitanin um møguligar olju- og gassgoymslur í føroyskum øki størri og leitingaráhugin av álvara farin at taka seg upp. Samstundis standa føroyskar fyritøkur og sam-…ið sum heild enn meira …gvið at veita tænastur …í fralandavinnuna.

Aðrar framsýningar í 1996 og 1997

Í 1996 buðu føroyskar fiskasølufyritøkur seg fram á EUROPEAN SEAFOOD EXPOSITION 96 í Brússel, og reikað verður aftur fyri luttøku á hesari somu framsýning í 1997, har fyritøkurnar hava høvi at hitta sínar verandi keyparar og finna møguligar nýggjar. European Seafood Exposition er í dag hin mest globala fiskasøluframsýningin í heiminum, har keyparar og fiskaseljarar úr øllum heiminum møtast í høvuðsstaðnum í Europa.

Til seinast er at nevna, at føroysk heimavirkisfólk og listahandverksfólk fara at luttaka á handverksframsýning á Akureyri í døgunum 15.–18. august 196. Hettta er fyrstu ferð onnur enn íslendingar luttaka, og umframt føroysk handverksfólk, ið vilja selja og menna sítt virksemi meira, fara luttkarar eisini at koma úr Grønlandi g Norðurnoregi.

Føroyska fyritøkur og stovnar, ið hava áhuga at vera við á framsýningum uttanlands í 1997, eru altíð vælkomin at venda sær til Menningarstovuna.